## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig – um kvøldið niður í 3 stig og møguliga kavaælingur.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í ein strúk av norði, men sunnudagin minni vindur. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitin millum frostmarkið og +4 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# »Eg sá at tað fór at enda galið«

**39 ára gamli Jóhan Jacobsen arbeiðir sum lívbjargari í Svimjihøllini í Havn. Her er hansara uppgáva m.a. at ansa eftir teimum 150.000 fólkunum, sum árliga vitja í hylunum. Einaferð bjargaði hann einari smágentu.**

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*– Jóhan Jacobsen hevur arbeitt í mong ár sum lívbjargari í Svimjihøllini. Tað dámar honum væl*

**■ Hvat ger ein lívbjargari?**
– Vit ansa eftir øllum tí sum fer fram í høllini. Og so vaska vit eisini í høllini og í umklæðingarrúmunum. Annars skulu vit taka lívbjargingarroyndina eina ferð um árið.

**■ Hevur tú verið út fyri at bjarga onkrum í hylinum?**
– Ja, – einaferð bjargaði eg einari smágentu. Mamman svam aftur og fram í stóra hylinum, tá gentan brádliga fór úr barnahylinum og leyp í tann stóra hylin. Hon leyp útí, og tá fóru armringarnir av, soleiðis at gentan fór beint á botn. Eg sá at tað fór at enda galið beinanvegin, tá ið hon leyp, og fekk bjargað henni

**■ Er tað ikki ringt at halda eyga við øllum tí sum fer fram í hylinum?**
– Vit eru tvey fólk úti í høllini samstundis, so vit supplera hvønn annan. Tey sum svimja kunnu tí føla seg trygg allatíðina

**■ Tá tú ikki er til arbeiðis - hvat ger tú so?**
– Tá eri eg saman við vinfólkum og gangi túrar. Annars svimji eg eitt sindur.

**■ Hvørjum vil tú heilsa?**
– Eg vil fegin heilsa familju og vinfólkum.




Sosialurin

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | -2 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 10 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 17 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 38 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | 20 |
| New York | 18 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1032 hPa. við Hvarvið viknar. Eitt lágtrýst, 1026 hPa. við Jan Mayen fer eystureftir og kuldabrúgvin haðani kemur hendavegin.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Lofoten fer eystureftir og dýpist. Kuldabrúgvin haðani til Ísland fer suðureftir og fer um Føroyar hósnáttina.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 8/5 kl. 06⁰⁰– 9/5. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í mai: -3,0° - Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 8/5 kl. 06⁰⁰– 9/5 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 14,2 mm




**Vika 18 – 6. mai**
Vinnaratøl: **06 - 12 - 21 - 22 - 28 - 29 - 36**

Eykatøl: **04 - 05**

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | **1.266.814,- kr.** |
| 6 vinnarat.+ eykatal: | **68.252,- kr.** |
| 6 vinnaratøl | **4.274,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **162,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **44,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



**Vika 18 – 6. mai**
Jokaratal: **2 - 6 - 3 - 0 - 9 - 1 - 6**

| | |
|---|---|
| Øll 7 røtt: | **Eingin/0,- kr.** |
| 6 aftastu røtt: | **237.123,- Kr.** |
| 5 aftastu røtt: | **15.326,- kr.** |
| 4 aftastu røtt: | **1.942,- kr.** |
| 3 aftastu røtt: | **241,- kr.** |
| 2 aftastu røtt: | **50,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 7. mai | Mánin longst frá jørðini |
| 13. mai | Fullmáni |
| 20. mai | Seinna kvarter |
| 22. mai | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. mai | 04.53 | 17.09 | 03.53 | 16.09 | 04.08 | 16.24 | 06.53 | 19.09 | 07.53 | 20.09 | 03.08 | 15.24 | 02.08 | 14.24 | 05.08 | 17.24 | 06.08 | 18.24 | 04.38 | 16.54 | 05.53 | 18.09 |
| 10. mai | 05.26 | 17.43 | 04.26 | 16.43 | 04.41 | 16.58 | 07.26 | 19.43 | 08.26 | 20.43 | 03.41 | 15.58 | 02.41 | 14.58 | 05.41 | 17.58 | 06.41 | 18.58 | 05.11 | 17.28 | 06.26 | 18.43 |
| 11. mai | 06.01 | 18.17 | 05.01 | 17.17 | 05.16 | 17.32 | 08.01 | 20.17 | 09.01 | 21.17 | 04.16 | 16.32 | 03.16 | 15.32 | 06.16 | 18.32 | 07.16 | 19.32 | 05.46 | 18.02 | 07.01 | 19.17 |
| 12. mai | 06.34 | 18.56 | 05.34 | 17.56 | 05.49 | 18.11 | 08.34 | 20.56 | 09.34 | 21.56 | 04.49 | 17.11 | 03.49 | 16.11 | 06.49 | 19.11 | 07.49 | 20.11 | 06.19 | 18.41 | 07.34 | 19.56 |

5 707265 100036 >